# Reglugerð fyri stuðul til umhvørvistiltøk



**ENDAMÁL**

**§1** Játtanin hevur til endamáls at stuðla verkætlanum, sum:

- menna vitanina um umhvørvi
- virka dálkingarfyribyrgjandi og/ella avmarkandi
- virka orku – og tilfeingissparandi
- kunna almenningin um umhvørvisviðurskifti
- verja landsløg, djóra- og/ella plantusløg

**STUÐULSTREYTIR**

**§2** Stuðul kann verða veittur einstaklingum, ið eru búsitandi í Tórshavnar kommunu og feløgum, stovnum og virkjum, ið eru skrásett sum heimahoyrandi í Tórshavnar kommunu. Stuðul kann eisini verða veittur øðrum, ið ikki eru búsitandi ella skrásett í kommununi, treytað av, at verkætlanin tá er til gagns fyri umhvørvið í Tórshavnar kommunu. Stuðulin skal í minst møguligan mun virka kappingaravlagandi. Verkætlanin skal vera almenn gagnlig.

Stk. 2 Um ikki heilt serlig viðurskifti gera seg galdandi, kann eingin umsókn fáa játtað meira enn helvtina av samlaðu játtanini í einum fíggjarári.

Stk. 3 Tórshavnar kommuna skal hava upplýsingar um og innlit í arbeiðsgongdina, og hvussu peningurin verður nýttur.

Stk 4 Tórshavnar kommuna skal hava skrivliga frágreiðing um, hvussu stuðulin hevur verið nýttur, og hvussu verkætlanin hevur virkað sambært endamálinum innan eitt hálvt ár eftir, at verkætlanin er endað. Havast skal í huga at frágreiðingin skal almannakunngerast. Hetta merkir at tilfarið skal kunna nýtast á heimasíðuni og møguliga í faldara til borgaran. Týdningarmikið er, at uppsetan, rættlestur og grafikkur eru væl frágingin.

Stk. 5 Tórshavnar kommuna kann seta innihaldslig krøv til verkætlanina, sum treyt fyri at veita stuðul.

Stk. 6 Umsøkjarar, sum hava fingið tilsøgn um stuðul, skulu innan eina nærri ásetta tíðarfreist geva boð um, hvørt stuðulin verður nýttur ella ikki.

Umsøkjarar, sum hava fingið tilsøgn um stuðul á kr. 30.000 og harundir, fáa stuðulin útgoldnan eftir at verkætlanin er endað og latin Tórshavnar kommunu bæði sum skjal og sum talgild fíla.

Stuðulsmóttakarin skal skjalprógva allar sínar útreiðslur.

GG: Stuðulin kann bert nýtast til starvsløn, tá mett verður at arbeiðið, sum er í uppskoti, krevur hetta. Kommunan tilskilar sær rætt at meta um arbeiðsbyrðuna. Tímataksturin kann ikki vera hægri enn tímataksturin sum er ásettur í almennu sáttmálunum.

Stk. 7 Umsøkjarar, sum hava fingið tilsøgn um stuðul hægri enn kr. 30.000,-, kunnu fáa 90% av játtaðu upphæddini goldna út, áðrenn verkætlanin er liðug. Upphæddin verður goldin sambært skjalprógvi, ið kann verða rokningar, kvittanir v.m.

Restupphæddin verður útgoldin eftir at verkætlanin er endað og latin Tórshavnar kommunu bæði sum skjal og sum talgild fíla. Stuðulsmóttakarin skal skjalprógva allar sínar útreiðslur.

Gongur verkætlanin yvir fleiri ár, má søkjast av nýggjum á hvørjum ári. At stuðul er latin eitt ár, er ikki trygd fyri at stuðul verður latin aftur komandi árið.

Stuðul, sum ikki er nýttur í seinasta lagi 31. desember árið eftir stuðulsárið, fellur burtur, tó kann í serligum førum verða givið undantak frá hesum.

Tórshavnar kommuna tilskilar sær nýtslurætt til móttiknar verkætlanir.

Stk. 8 Framganga skal klárt av endaligu verkætlanini, at Tórshavnar kommuna hevur stuðlað. Um verkætlanin seinni verður broytt, ella ætlan verður at selja verkætlanina, skal avtala gerast um hetta við Tórshavnar kommunu og tað skal klárt framganga at Tórshavnar kommuna hevur stuðlað.

**UMSÓKN**

**§3** Umsókn um stuðul skal vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 15. mars á hvørjum ári. Lýst verður við hesum í bløðunum og á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu, torshavn.fo

Um ikki øll játtanin verður nýtt í fyrsta umfari, so kann verða lýst av nýggjum við nýggjari umsóknarfreist.

Stk. 2 Saman við umsóknini skal vera skrivlig lýsing av verkætlanini við í minsta lagi fylgjandi upplýsingum:

- Endamál og útgreinað lýsing av ætlanini
- Hvørjum málbólki verkætlanin er miðað móti
- Leiðari av verkætlanini, herundir upplýsing um útbúgving og starvsroyndir
- Kostnaðar- og fíggjarætlan fyri verkætlanina, herundir lønarviðurskifti
- Tíðarætlan fyri verkætlanini
- Um nøkur ætlan er fyri verkætlanina, tá stuðulstíðin er liðug
- Hvat hendir við keyptum ognunum hjá verkætlanini, tá stuðulstíðin er liðug

**§4** Tórshavnar kommuna tilskilar sær rætt til, alt eftir hvørjar verkætlanir kommunan metir eru mest týðandi og viðkomandi at stuðla frá tíð til aðra, at leggja ymiskan dent á ymisku endamálini í §1.

Stk.2 Kommunan tilskilar sær eisini rætt til ikki at veita stuðul, hóast tiltakið í umsóknini liggur innanfyri endamálini í §1, og hóast játtanin rúmar hesum, um kommunan ikki metir tiltakið vera nóg viðkomandi ella nóg týðandi.

**VIÐGERÐ AV UMSÓKNUM**

**§5** Tá umsóknin er móttikin, kannar Tórshavnar kommuna, um allir upplýsingar eru á blaðnum. Vanta upplýsingar, verður umsóknarblaðið sent umsøkjaranum aftur við áheitan um at fylla blaðið út av nýggjum innan eina ávísa tíðarfreist. Metir umsitingin at umsóknarblaðið ikki er nøktandi fylt út, verður umsóknin ikki viðgjørd.

Stk. 2. Tá umsóknarfreistin er farin, setir Umhvørvisdeildin metingarnevnd at gera eitt tilmæli til Náttúru- og umhvørvisnevndina um, hvussu peningurin á játtanini skal býtast ímillum umsøkjarar. Svar verður givið í Umhvørvisvikuni í stuðulsárinum.

Stk 3. Samstundis sum svar verða send umsøkjarum, verður á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu kunnað um, hvørjar verkætlanir hava fingið stuðul, hvat tær snúgva seg um, og hvør hevur ábyrgdina av teimum. Hesir upplýsingar verða tiknir beinleiðis úr umsóknarblaðnum.

Stk 4. Umsøkjarar skulu eina viku aftaná umsóknarfreistina tvs. 22. mars ella fyrsta gerandisdag eina viku aftaná umsóknarfreistina, vera tøkir at hava eina munnliga framløgu (10-15 min) at greiða nærri frá verkætlanini, og har høvi er hjá Tórshavnar kommunu at seta spurningar v.v. verkætlanini.

Stk. 5. Umsøkjarar, ið hava fingið lægri játtan enn søkt var um, skulu lata inn dagførda fíggjarætlan, ið skal góðkennast av umsitingini, áðrenn verkætlanin kann byrja.

*Samtykt í Náttúru- og umhvørvisnevndini 14. september 2017*